ítróttur

Nr. 117 • leygardagur • 22. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Føroyar skaptu sensatiónina

**Kvinnurnar vunnu stórsigur á einum av mætastu bridge-tjóðunum í Europa, og menninir megnaðu í sera spennandi dysti at basa Russlandi**

BRIDGE
*Jákup Mørk*



*Tað tykist, sum um landsliðsvenjarin í bridge, Svend Novrup, veruliga hevur funnið allar trumfirnar fram, nú Føroyar á fyrsta sinni taka lut í EM-undankappingini*

Føroyar, sum fyri fyrstu ferð yvir høvur tekur lut í EM-kappingini í bridge, hevði longu undan hósdegnum skapt nøkur óvæntað úrslit, men nú ber av.

Stórveldið, Russland, mátti í hósdagin lúta, tá teir sótu yvirav Boga Simonsen – Rói á Røgvu Joensen og Heðin Mouritsen – Jóannes Mouritsen.

Fyrstu løtuna tóku Føroyar mótstøðumenninar fullkomuliga á bóli, og eitt skifti var leiðslan 44-2. Russar komu tó sterkt aftur. Undan seinasta spælinum var støðan 58-59, og allir á føroyska liðnum vónaðu bara, at teir megnaðu at halda einum javnleiki, men tað gjørdist betri enn sum so. Heðin og Jóannes meldaðu ein lítla-slem, sum russararnir brendu, og so máttu teir úr stórveldinum bara ásanna eitt stórt afturstig í royndunum at vinna sær pláss við HM.

Føroysku menninir eru framvegis á 33. plássinum í samlaðu støðuni, men tað skerst ikki burtur, at framúrskarandi úrslitið ímóti Russlandi gevur sera góðar vónir, nú teir komandi dagarnar skulu hitta fleiri av veikaru tjóðunum

### Kvinnurnar bastu favorittunum

Var avríkið hjá monnunum gott, so var tað ikki minni gott hjá kvinnunum. Marjun Restorff-Arnleyg Mikkelsen og Joan Grunnveit-Majken Johansen, tóktust vera farnar undir eina ógjørliga uppgávu móti Fraklandi, sum á pappírinum verður mett sum næst sterkasta liðið í kappingini.

Allan dystin ígjøgnum vóru føroysku kvinnurnar greitt á odda. Í seinasta spælinum meldaðu fronsku kvinnurnar 13 IMP, men var bert nóg mikið til at bjarga teimum undan tí heilt stóru eyðmýkingini, sum tað vildi verið, um Føroyar megnaðu at halda favorittunum á eitt-siffraðum stigatali. Endaliga úrslitið gjørdist 19-11 til føroyska liðið, sum sostatt hevur skorað 38 stig í trimum dystum, og røkkur hetta til eitt 19. pláss í kappingini. Hartil skal sigast, at teir tríggir dystirnir, sum Føroyar hava spælt, allir hava verið ímóti tjóðum, sum eru millum tær sjey ovastu í kappingini.

Landsliðsvenjarin, Svend Novrup, sigur í stuttari viðmerking, at hóast frálíku úrslitini hósdagin, so skulu vit varin við at seta føroysku liðunum alt ov stór krøv. Men hann leggur afturat, at við evnunum, viljanum og samanhaldinum, sum liðini hava, skulu tey nokk syrgja fyri, at komandi dagarnir eisini fara at kasta okkurt positivt av sær. Í fyrstu atløgu sigur hann tó, at nú skulu kvinnurnar hugsa um dystin móti Íslandi í fjórða umfarinum.

# Sundalagsstevnan

**Tær 52 bátsmanningarnar, sum hava boðað frá luttøku til sundalagsstevnuna, liggja í hesi nummarrøð á startinum**

**5-mannafør, dreingir**
1 Sílið
2 Ørnin
3 Tjaldrið
4 Blikur
5 Fípan Fagra
6 Havfrúgvin
7 Drekin
8 Junkarin

**6-mannafør, kvinnur**
1 Lómur
2 Víkingur
3 Gongurólvur
4 Páll Fangi
5 Jarnbardur
6 Riddarin
7 Hvessingur
8 Sølmundur
9 Snopprikkur

**5-mannafør, gentur**
1 Bráddur
2 Dúgvan
3 Royndin Fríða
4 Frúgvin
5 Havfrúgvin
6 Blikur
7 Ørnin
8 Sílið
9 Fípan Fagra
10 Drekin
11 Tjaldrið
12 Tekla
13 Junkarin
14 Firvaldur

**6-mannafør, menn**
1 Víkingur
2 Snopprikkur
3 Sølmundur
4 Gongurólvur
5 Páll Fangi
6 Smyril
7 Hvessingur
8 Strálan
9 Jarnbardur
10 Hósvíkingur

**8-mannafør**
1 Ørvur
2 Húsavíkingur
3 Argjabáturin
4 Kvívíkingur
5 Knørrur
6 Kvívíksbáturin

**10-mannafør**
1 Havnarbáturin
2 Klaksvíkingurin
3 Eysturoyingur
4 Vestmenningur
5 Nólsoyingur

# VB venjarin fekk sekkin

**Venjarin hjá besta mansliðnum í Vági, Dragan Kovacevic, hevur fingið sekkin frá leiðsluni**

UPPSØGN
*Jákup Mørk*

Leiðslan hjá VB gjørdi hósdagin av at siga ungverska venjaran hjá felagnum, Dragan Kovacevic, úr starvi.

Hjá teimum, sum fylgja við í best føroysku deildini, kemur uppsøgnin kanska ikki heilt óvart á. Longu undan landskappingarbyrjan var ein spírandi ónøgd at hóma millum leikararnar, og fyri góðari viku síðani bar av, tá Jón Pauli Olsen, Tórður Holm og Birgir Jørgensen allir boðaðu frá, at teir ikki spældu við VB, so leingi sum Dragan var venjari. At úrslitini hjá VB ikki hava verið betri, enn sjeynda plássið á stigatalvuni vísir, hevur helst eisini skundað undir avgerðina um at siga venjaran úr starvinum.

### Nýtt venjarapar

Hóskvøldið var so leikarafundur í VB húsinum, og har varð gjørt av, at hetta fram til summarsteðgin verður Marek Vierzbicki leikandi venjari hjá felagnum sum ein fyribils loysn, tó at tað ikki kann útilokast, at hetta verður varandi.

Samstundis er gjørt av, at Hans Nielsen, sum áður hevur leikt á besta VB-liðnum, skal taka sær av næst besta liði felagsin. Somuleiðis hetta fram til summarsteðgin.



# B68 á høkjum í Sveis



*B68 stóð seg sera væl í Inter-Toto kappingini í fjør. Teir fingu javnleik á útivølli móti Lokeren, meðan dysturin á heimavølli varð taptur. Hesa ferð er talan tó um nógvar skaðar, og tí eru vónirnar ikki eins góðar*

**Ivi er um fleiri lyklaspælarar vera førir fyri at spæla í kvøld, og Frank Skytte ásannar, at tað verður neyðugt at laga spælið eftir umstøðunum**

INTERTOTO
*Jóannes Hansen*

Klokkan seks í kvøld fer fyrsta føroyska felagið í europeiska eldin á hesum sinni. Talan er um B68, sum skal spæla á útivølli ímóti St. Gallen í Sveis. Talan er um fótbóltsflaggskipið í býnum St. Gallen, sum liggur í landnyrðingshorninum av Sveis – ikki so langt frá Liktinstein, Eysturríki og Týskalandi. Íbúgvaratalið er 71 túsund ella fleiri enn seksti ferðir so nógv, sum tað gera í Nes kommunu!

B68 ferðalagið fór av landinum fyrrapartin mikudagin, og teir verða aftur í Føroyum sunnudagin.

Luturin hjá føroyskum feløgum í altjóða fótbólti hevur sum oftast verið ast stríðast ímóti liðum, sum eru væl betri fyri enn føroyingarnir. Hóast Sveis ikki verður roknað millum europeisku stórtjóðirnar í fótbólti – eitt nú eru teir ikki við í HM endaspælinum hesa ferð – so verður talan um ivaleysa stórt stríð hjá B68.

Í kappingarárinum, sum var liðugt fyri góðum mánað síðani, endaði St. Gallen á sætta plássi. Nú hava teir fyrireikað seg í meiri enn tvær vikur til nýggja kappingarárið. Í felagnum eru ikki færri enn tíggju útlendingar. Sum á Toftum, so hava teir í Sveis tríggjar brasiliumenn í hópinum. Ein av St. Gallen spælarunum hevur júst luttikið í HM endaspælinum. Tað er miðvallarin Tebeho Mokoena úr Suðurafrika. Tað er kortini ivasamt, um hann verður við ímóti B68 í kvøld.

Tá vit høvdu samband við Frank Skytte, dugdi hann ikki at siga okkum, hvussu sveisiska liðið verður mannað:

– Ofta brúka venjarar hesa kappingina at gera royndir í, áðrenn tað verður farið undir eitt nýtt kappingarár. Eg rokni bara við, at teir ikki rokna okkum fyri nakað serligt, og at teir tískil fara at geva fleiri óroyndum monnum møguleikan. Tað eigur at verða okkara møguleiki.

Hava tit nakran møguleika?

– Teir eru sjálvandi stórfavorittar, og vit skulu ikki rokna við at fáa nógvar málmøguleikar. Men vit fara at gera okkara besta. Vit taka hetta sum eina eyka avbjóðing, og tað er sjálvandi eitt upplivilsi hjá spælarunum at sleppa út um landoddarnar í Føroyum at royna seg.

Frank Skytte er royndur venjari, men hetta er fyrsta ferðin, at hann hevur ábyrgdina av einum liði í europeiskari kapping. Eina ferð hevur hann roynt seg sum spælari í Europa Cup:

– Tað var eftir, at vit í Fremad Amager í 1972 høvdu tapt steypafinaluna ímóti Vejle. Teir vunnu eisini meistaraskapin, og so komu vit upp í part í Europa Cup fyri steypavinnarar. Vit spældu ímóti einum albanskum liði. Í Sundby Idrætspark var úrslitið 1–1, og í Albania var málleyst. Tí vórðu vit sendir úr kappingini uttan at hava tapt. Í felagnum erpa teir sær framvegis av, at teir eru einasta danska felagið, sum hevur luttikið í Europa Cup, og sum ikki hevur tapt!

Frank Skytte heldur, at tað sæst væl, at føroysku feløgini hava verið við í Europa Cup í nøkur ár:

– Tá eg hugsi aftur á, hvussu Fremad Amager fyrireikaði seg fyri tredivu árum síðani, og hvussu B68 nú hevur fyrireikað seg til Intertoto Cup, so er munurin ógvuliga stórur. Professonalisman er nógv størri hjá B68. Eg sigi hetta, tí ofta havi eg ta fatan, at føroyingar síggja seg sjálvar at standa aftarlaga, tá sammett verður við aðrar.

Hvat meinar tú við, tá tú tosar um góðar fyrireikingar?

– At vit fóru úr Føroyum mikudagin, og at vit hava vant tvær ferðir hósdagin og tvær ferðir fríggjadagin, og at vit í fínum umstøðum hava møguleika at hvíla og fáa viðgerð frá fysioterapeuti, tað haldi eg vera flott.

B68 venjarin letur væl at umstøðunum. B68 býr í lítlum býi, sum er eitt korter í bili uttanfyri St. Gallen.

– Gistingarhúsið er gott, og vertsfelagið hevur lænt okkum tveir 10 persónabilar, sum vit koyra til venjingar í. Tað tekur tríggjar minuttir at koyra til eitt lítið stadion. Fríggjakvøldið klokkan 18 skulu vit til St. Gallen at venja á stadion, har vit skulu spæla.

Hitin plagar at vera nógvur í Alpunum um summarið?

– Teir báðar fyrstu dagarnar her niðri vóru tað 35 hitastig. Tíbetur verður sagt frá eitt sindur svalligari veðri leygarkvøldið.

### Lyklaspælarar sera ivasamir

Tá B68 sunnudagin var í Vági, hevði venjarin skift út á fimm plássum sammett við hálvfinaludystin ímóti NSÍ hóskvøldið:

– Eg var vónbrotin av, at fleiri spælarar ikki løgdu meiri fyri í so týdningarmiklum dysti. Hetta segði eg teimum kvøldið eftir, og eg var fegin um, at hugburðurin hjá teimum, sum spældu í Vági, var rættur. Allir arbeiddu fyri søkini, og tað eydnaðist at vinna stigini, sum vóru so sera týdningarmikil, um vit ikki skuldu detta heilt niður ímillum. Nú hava vit tvær vikur at hugsa um altóða uppgávurnar. Tíðin skal nýtast at styrkja samanhaldið, sum frammanundan er gott, uppaftur meiri, so vit vera væl fyri, tá vit í aðru viku skulu spæla á Skála og so í Gundadali ímóti HB.

Hjá B68 eru tað tríggir spælarar, sum hava nógvar royndir í altjóða fótbólti. Teir eru Øssur Hansen, Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen. Tær síðstu ferðirnar hevur Hans Fróði spælt meiri ella minni hálvskaddur. Í Vági noyddist hann av vøllinum, tá tað restaði eitt lítið korter. Hans Fróði er í B68 ferðalagnum í Sveis, men hann er ikki førur fyri at spæla.

Jan Petersen og Anders Nygaard eru eisini í ferðalagnum. Anders verður ikki førur fyri at spæla í dag. Um Jan, sum fekk løst í steypadystinum ímóti NSÍ, verður førur fyri at spæla, er sera ivasamt. Tað er eisini eitt sindur ivasamt við Øssuri Hansen. Hann hevur trupulleikar við lærinum.

– Eg vóni, at í hvussu so er Øssur verður tøkur. At vit hava fysioterapeut við okkum ger, at spælararnir fáa nógv meiri viðgerð, enn tá teir eru í Føroyum og hava arbeiði at hugsa um. Tí gongur tað skjótt við at betra um heilsustøðuna hjá skaddu monnunum, sigur Frank Skytte.

**Ekspeditrisa**
til bakaran í SMS

Bakarin í SMS sóknast eftir fólki til sølubúðina at byrja skjótast tilber.

Arbeiðstíðin er sett til uml. 30 tímar um vikuna við skiftandi vaktum.

Løn eftir sáttmála við S & K.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn til Bakaran í SMS.

Tú kanst eisini seta teg í samband við Eirik, um tú vilt hava meira at vita um starvið, tlf. 31 30 46.

*Miklagarður er største matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1700 fermetrar og við meira enn 10000 vørunumrum. Í Miklagarði starvast uml. 80 fólk.*

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 52 62